# Tungmálms muSICur á fløgu

**Føroya tyngsti tungmálmsbólkur gevur í dag fløguna Pandemonium út, eina fløgu, ið føroyski tónleikaheimurin hevur bíða eftir í spenningi.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Trý ár eftir at tungmálmsbólkurin Sic fyrstu ferð fór í venjingarhølið, er fyrsta fløgan Pandemonium í dag komin á marknaðin. Talan er um eina fløgu, ið bólkurin sjálvur ætlar skal gerast ein vari, í føroyskum tónleiki.

Í sambandi við útgávuna verður í kvøld útgávuveitsla á REX. Har verður høvi at provokera sansirnar við eini heildarupplivíng av SIC. Sjón og hoyrn fáa av at vita, og okkurt smávegis verður eisini til smakkisansin.

Bólkurin sigur sjálvur, at nýggja útgávan skal altjóðagera SIC, og hetta tykist ikki heilt burturvið. Tí longu áðrenn útgávan er vorðin veruleiki, hava fleiri útlendskar málmsútvarpsstøðir víst henni stóran áhuga. M.a. var Sic herfyri at hoyra í avstralskum útvarpi, eins og fleiri aðrar støðir í næstum fara at spæla Sic.

Á tiltakinum í kvøld fer SIC at framføra nøkur løg av nýggju fløguni og vísa okkurt spennandi nýtt tilfar á stórskíggja. Fløgur, T-shirtir og annað verður selt fyri serprís, umframt at SIC signera fløgur.

Tiltakið er alment, og í tíðindaskrivi verða fólk biðin um, at møta fjølment og vera við at hátíðarhalda, at Pandemonium gerst varði í føroyskari og altjóða málmssøgu.

Útgávutiltak í REX verður í kvøld, mánakvøldið 26. februar kl 19.00



# Trý í einum triðja í triðja

**Leygarkvøldið verður høvið at hoyra 3 av okkara fremstu tónleikabólkum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

The Dreams, Boys in a Band og Marius spæla leygarkvøldið 3. mars í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tað eru bólkarnir, ið skipa fyri konsertini í samstarvi við Føroya Undirhalds Tónleikarafelag.

The Dreams verða flognir heim við Atlantic Airways til kvøldið í Mentanarhúsinun, har teir fara at spæla upp til orkumikla punk konsert.

Stjørnuskotini í Boys In A Band, ið júst hava otað seg upp á ovastu rók á 15 teim bestu, fara somuleiðis at framføra teirra sannførandi kovboy rock, ið á planet awards gjørdi bólkin til besta nýggja bólk í Føroyum.

Garvaðu garparnir og GBOB vinnarnarnir í 2005, Marius, hava spælt tað stóra seinastu tíðina. Men fara leygarkvøldið at borðreiða við sínum eyðkenda, sveimandi, progressiva popp/rokki.

Áðrenn, millum og aftaná framførslurnar leggur DJ Knýtil eitt eksplosivt úrval av lurti- og dansivinarligum tónleiki undir geiðslan.

Bussar koyra til tiltakið, og mælt verður til at áhugað ringja í góðari tíð.

Havn tlf nr: 595959

Klaksvík og Eysturoy tlf nr: 505220



# Pláturnar kliptar av nýggja rot-tangabilurin

**Nýggi rot-tangabilurin hjá Tórshavnar kommunu skuldi tryggja borgarunum betri tænastu, men hugurin hjá kommununi at veita hesa tænastu var ov stórur. Tey fingu ikki bíða, til bilurin var lógliga skrásettur, og úrslitið var at pláturnar vórðu kliptar**

FERÐSLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í síðsta vikuskifti klipti løgreglan nummarpláturnar av Hummer limousinuni hjá byin.fo. Hósdagin fekk nýggi rottangabilurin hjá Tórshavnar kommunu somu lagnu.

Hóast nógv hevur verið frammi í miðlunm um nýtslu av bilum, ið ikki eru skrásettir í Føroyum, sigur Boði Haraldson býarverkfrøðingur, at talan er um ein "tankatosk" og eitt mistak, tá bilurin hjá Tórshavnar kommunu varð nýttur, hóast skrásetingin í Føroyum ikki var avgreidd. Boði greiður frá, at pappírsarbeiðið fríggjamorgunin var avgreitt, og bilurin hevur fingið føroyskar nummarplátur.

Boði veit einki um, at málið fær nakrar víðari avleiðingar fyri kommununa. Nýggi Volvo rot-tangabilurin er eitt sonevnt avvatningsannlegg við 10.500 litur tang. Talan er um ein bil við nýggjastu og mest framkomnu tøknini innan amboð av slíkum slagi. Kommunan segði við Sosialin í seinastu viku, at bilurin fór at lætta um arbeiðsgongdirnar og tryggja, at borgararnir fingu betri tænastu.




## Eldur í húsum í vesturbýnum í Havn

Stutt fyri kl. 10 í gjáramorgunin kom fráboðan til alarmsentralin um, at eldur var komin í eini hús á Vilhelmstrø í Havn. Sløkkiliðið kom skjótt á staðið og gjørdi og fekk tamarhald á eldinum. Boðini um eldin komu frá fólki í grannalagnum, ið varðnaðust eldin. Av løgreglustøðini í Havn verður sagt, at eldur var komin í við ein kaminu ella ein brenniovn, har kynt var upp. Smávegis skaði var komin rundan um kaminuna, men eldurin varð sløktur skjótt eftir. Eingin fólkaskaðið stóðst av eldinum.